tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 26.08.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jónhild Nybo

Ikki møtt: Alvi Mortensen, fráboðað

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 47/21 | 21/00181-7 | Býráðslimur berst frá at møta til býráðsfund - Alvi Mortensen, og ynskir at varalimur fær fundarboð |
| **Til kunningar** | | |
| 20/21 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| 21/21 | 21/00539-1 | Fíggjarætlan -FÆ2022 |
| 22/21 | 21/00540-2 | Heiðran av ítróttarfólkum og tilflytarum aug. 2021 |
| 23/21 | 21/00490-1 | BHS Bú- og heimatænastan -kunning um økið frá stýrislimi hjá TVK 2021 |
| 24/21 | 21/00541-2 | Fólkatingið á vitjan sep. 2021 |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri spyr um viðmerkingar eru til skránna. Ongin viðmerkin.
Einmælt samtykt

**Til støðutakan**

**47/21**
**21/00181-7 Býráðslimur berst frá at møta til býráðsfund - Alvi Mortensen, og ynskir at varalimur fær fundarboð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.08.2021 | 47/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Alvi Mortensen berst frá at møta til býráðsfundin í tíðini 17. Aug. til 6. Sep., og ynskir at varalimur fær fundarboð.

Samb. valúrslitinum av kommunuvalinum 10. november 2020, er tað Jónhild Midjord Nybo, sum er 1. varalimur fyri Felagslistan til sæti í býráðinum á Tvøroyri.

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *§ 18. Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*
    - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
    - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Samsýning til tiltakslimin

**Tilmælið:** Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

**Býráðið 26. august 2021:**
Einmælt samtykt at Jónhild Nybo tekur sæti í býráðnum fyri Alva Mortensen, sum hevur fráboðað fráverðu í tíðini 17/8 til 6/9 2021.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**Til kunningar**

**20/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 7/21 |
| 10 Býráðið | 16.06.2021 | 12/21 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 9/21 |
| 12 Býráðið | 26.08.2021 | 20/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**
- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunna.

**Kommunustjórin 20.04.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-mars)

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 26. april 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Kommunustjórin 15.05.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-apr)

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**21/21**
**21/00539-1 Fíggjarætlan -FÆ2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 46/21 |
| 2 Býráðið | 26.08.2021 | 21/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 22.08.2021)**
Mælt verður til at byrja uppá uppskot til fíggjarætlan 2022 og at fíggjarætlanin verður ætlandi viðgjørd av sum niðanfyri:

- 23. august verður áheitan sent til allar nevndarform/kv. og deildarleiðarar um at byrja uppá fíggjarætlan fyri 2022.
- 30. September, uppskot/kunning til fíggjarætlan "FÆ2022" verður viðgjørd á býráðsfundi 30 september, har ásett verður inntøkumetingar, barnafrádrátt og skattaprosent.
- 28. Oktober, 1. viðgerð verður at leggja fyri býráðið til samtyktar 28. Oktober.
- 25. November, 2. viðgerð, -*fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember*-, verður viðgjørd á býráðsfundinum, sum er lýstur at vera 25. November.

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
    - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember****.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt at 2. viðgerðin av fíggjarætlan verður í døgunum 14,15& 16 november.

22/21

**21/00540-2 Heiðran av ítróttarfólkum og tilflytarum aug. 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.08.2021 | 22/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Heiðran av ítróttarfólkunum og móttøka fyri tilflytarunum verður í ítróttarhøllini fríggjadagin 27. August, kl. 17.00.

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**23/21**
**21/00490-1 BHS Bú- og heimatænastan -kunning um økið frá stýrislimi hjá TVK 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.08.2021 | 23/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 23.08.2021)**
Borgarstjórin –form. í stýrinum- greiðir frá gongdini í BHS

**Býráðið 26. august 2021:**
Borgarstjórin kunnaði um arbeiði í stýrinum. Kunna var m.a. um, at fyrisp. var sendur til løgfrøðing, sum upplýsir at tað ber til hjá kommunum at lata alla afturberingina til BHS samstarvið. Anita Vibergsdóttir mælir til, at leiðslan fyri BHS verður boðin á fund við býráðið at kunna um gongdina í BHS, og at sosialu nevnd tekur hetta upp til viðgerðar.

Kunna var um, at dómur var avsagdur í landsrættinum um málið við Sílá.

## 24/21
## 21/00541-2 Fólkatingið á vitjan sep. 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.08.2021 | 24/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá ríkisumboðnum, ið ynskir at vitja á Tvøroyri saman við 15 limum úr Fólkatinginum mánadagin tann 13. September í tíðarskeiðinum kl. 14.00 til 18:30 tá smyril siglur av Krambatanga.

Umsitingin hevur gjørt eina skrá fyri vitjanina, sum byrjar mánadagin kl. 14:00 í Gl. Kgl. Handil  har allir býráðslimir eru vælkomnir.

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 17:40

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Jónhild Nybo

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen